## Mentan í barnagarðin

Í framtíðini skulu grønlendsk børn, sum eru í barnagarði, læra meiri um grønlendsaaka mentan og grønlendskt barnaspæl. Tað ber í sær, at tey gomlu barnaspølini skulu í barnagarðarnar, samstundis sum náttúran og tey eldru verða partur av tí vanliga degnum. Tað er úrsliti av einari ráðstevnu, sum júst hevur verið, og har var semja um at taka grønlendsku mentanina inn í barnagarðarnar - bæði í spæli og tí pedogogiska arbeiðinum.

## Flytifuglar og fuglakrím

Í næstum koma flytifuglarnir aftur, og í Danmark hava myndugleikarnir gjørt av herða tilbúgvingina í sambandi við fuglakrím, nú flytifuglarnir koma aftur. Í mars í fjør bleiv staðfest, at fuglakrím av slagnum H5N1 var komið til Danmarkar við flytifugli. Tí hevur Matvørustýrið gjørt av, at tey, sum hava høsn og annan flogfenað, skulu fylgja reglunum um fyribyrging ímóti fuglakrími. Tí skal allur flogfenaður hegnast inni og haldast undir taki.



# Fyrstu fólkini rýmd

**Tvey starvsfólk á Strandferðsluni hava longu sagt seg úr starvi, og fleiri eru væntandi, siga fólk á stovninum.**

**– Ótryggleiki valdar nú millum øll almenn starvsfólk í Havn, tí hvat hendir næstu fer ein landsstýrismaður við aðrar dialekt skal røkja sítt valdømi? spyr annað starvsfólkið, sum hevur sagt upp**

STRANDFERÐSLAN
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Hansina er hørm um at 9 góð ár skuldu enda soleiðis, og hon heldur handfaringina av málinum vera út um alt mark*

Seinastu dagarnar hava nógv fólk róð framundir, at starvsfólkini á Strandferðsluni fara at rýma, áðrenn fyrireikingarnar til flytingina eru lidnar. Somu fólk hava hildið uppá, at hetta fer at syndra stovnin, og at fáa álvarsligar avleiðingar fyri nýggju Strandferðsluna sum heild.

Í morgun frættist so, at tvey starvsfólk longu hava sagt seg úr starvi, og sambært Tórfríð Johannesen, álitisfólk á Farstøðini og Samferðsludeildini, eru fleiri onnur eisini farin at leita sær eftir nýggjum avbjóðingum norðanfjørðs.

### Skilir púrt onki

Hansina Waagstein, hevur starvast á Strandferðsluni í 9 ár. Umframt at vera lønarumsitari og skrivstovufólk, er hon eisini álitisfólk.

– Eg fekk tilboð um annað starv, og gjørdi av at taka av beinanvegin. Sostatt fari eg hiðani 1. mars, sigur hon við Sosialin.

Hansina er hørm um at 9 góð ár skuldu enda soleiðis, og hon heldur handfaringina av málinum vera út um alt mark.

Spurd, um tað kom óvart á hana, at stovnurin flytur suður, sigur hon:

– Eg hevði forsvorið, at teir fóru at flyta stovnin til Tvøroyrar. Dugi ikki við mínum besta vilja at síggja endamálið við tí. Strandferðslan er so nógv meira enn bara Smyril, og hevur skyldur at røkja kring alt landið. Tí skal stovnurin sjálvsagt vera í Miðstaðarøkinum, sigur Hansina Waagstein. Samstundis leggur hon dent á, at í øllum førum átti politiska ætlanin at verið meira langsiktað, ella í smærri bitum.

– Handfaringin og kunningin til starvsfólkini hevur verið sera ótespilig, og kundi verið nógv meira virðilig, sigur Hansina Waagstein.

### Hvør verður næst

Hitt starvsfólkið, sum nú leitar sær nýggjar leiðir, er Martin Heinesen, skipsinspektørur. Hann byrjaði á Strandferðsluni í august, og gevst alt fyri eitt.

– Í mínum føri er tað torført at finna motivatión til at vera her, og eg haldi ikki, at eg havi skyldu til at vera loyalur, tí hetta var ikki tað, sum eg var settur í starv til, sigur Martin Heinesen, sum nú fer til skips.

Hann heldur, at stóra mistakið hendi, tá landsstýrismaðurin kunnaði starvsfólkini.

– Í staðin fyri at hava eina loysn, ella eina gularót, sum motiverar starvsfólkini til at vera við til at fyrireika flytingina, so tóktist hann als ikki keddur okkara vegna, sigur Martin Heinesen.

– Eg haldi tað verða ræðandi, at ein landsstýrismaður hevur tílíkt vald, at hann einsamallur ræður yvir lagnuni hjá, í hesum førinum, 20 fólkum, sigur Martin Heinesen, og hann vísir á, at nú var tað Strandferðslan, næstu ferð kanska ein annar stovnur.

– Ótryggleiki valdar nú millum øll almenn starvsfólk í Havn, tí hvat hendir næstu fer ein landsstýrismaður við aðrar dialekt skal røkja sítt valdømi?

# Hóttir við portørverkfalli

**Starvsmannafelagið setir nú Fíggjarmálaráðnum knívin á barkan í trætuni um portørarnar. Vil Fíggjarmálaráðið ikki tingast við Starvsmannafelagið um sáttmála fyri portørarnar, leggja portørarnir arbeiðið niður mánamorgunin 12. mars 2007, kl. 08.00**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Starvsmannafelagið hóttir nú við, at portørarnir fara í verkfall, vil fíggjarmálaráðið ikki samráðast um sáttmála fyri portørarnar, sum eru limir í felagnum.

Tað stendur millum annað í skrivi, sum felagið hevur sent út.

### Grov vanvirðing

Í skrivini stendur, at Fíggjarmálaráðið visti og fekk boð um, at næstan allir portørarnir tóku seg úr Havnar Arbeiðsmannafelag tann 1. oktober 2006. Hóast Fíggjarmálaráðið fekk greið boð um, at Havnar Arbeiðsmannafelag ikki longur umboðaði portørarnar og sostatt ikki hevði nakra fulltrú at samráðast teirra vegna, gjørdi ráðið nýggjan sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag fyri hesar persónar. Ynskið hjá portørunum um sáttmálatingingar gjøgnum Starvsmannafelagið varð púrasta skúgvað til viks. Hetta er ein grov vanvirðing av portørunum sum almennum starvsfólki og sum starvsbólki.

### Ósaklig dagsskrá

At Fíggjarmálaráðið ikki vil veita portørunum somu tænastu sum øðrum almennum starvsfólki og sýtir fyri at flyta limagjøld og tryggingargjøld til yrkisfelagið, vísir bara uppaftur greiðari, hvussu ósaklig dagsskráin hjá ráðnum er í hesum máli.

Sum Fíggjarmálaráðið uttanivaveit, er tað ein arbeiðsrættarlig høvuðsregla, at eitt fakfelag hevur krav upp á sáttmálasamráðingar/sáttmála, um talan er um eitt sáttmálaøki, sum natúrliga fellur inn undir fakliga virkisøkið hjá felagnum, og felagið hevur meginpartin av teimum starvandi á økinum sum limir.




### Eru okkara limir

Í hesum føri ger Fíggjarmálaráðið - hóast greið boð um at lata vera - sáttmála við eitt lokalfelag fyri Tórshavn, sum portørarnir kring landið einki natúrligt tilknýti hava til, og sum teir ikki eru limir í! Tað er eyðsæð, at Starvsmannafelagið, sum er eitt landsumfatandi felag á tí almenna sáttmálaøkinum, og sum hevur sáttmála fyri aðrar starvsbólkar á sjúkrahúsunum, er tann mest natúrligi sáttmálaparturin - ikki at tala um, tá portørarnir eru limir í felagnum.

Boðað verður tí við hesum frá, at vil Fíggjarmálaráðið ikki tingast við Starvsmannafelagið um sáttmála fyri portørarnar, sum eru limir í felagnum, fara nevndu portørar at leggja arbeiðið niður mánamorgunin 12. mars 2007, kl. 08.00.